# Nøvn í vikuni

## Kennir tú onkran …

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:.................................................................................................................

Bústaður:...........................................................................................................

Bygd/býur:...........................................................Tel:...................................

Evt. arbeiðspláss:............................................................................................

Merkisdagurin er: .............................................................................................

Innsendari: ..................................................................Tel:.............................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
Sosialurin • Postboks 76 • FO-110 Tórshavn • "Nøvn í vikuni"

Eisini ber til at støkka inn á gólvið, ringja, faxa ella senda teldupost til redaktiónir okkara kring alt landið:

Høvuðsstaðarøkið: tel. 34 18 00/21 61 35, fax 34 18 01, teldupost: maggi@sosialurin.fo

Suðuroy: tel. 37 53 64, fax 37 54 64, teldupost: aki@sosialurin.fo
Vágar: tel. 33 38 20, fax 33 37 20, teldupost: edvard@sosialurin.fo



Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at

**Kathrina á Neystabø**
ættað úr Haldarsvík

andaðist í heiminum leygardagin 5. august,
78 ára gomul.

Kistan fer úr Kapellinum á Landssjúkrahúsinum
týsdagin klokkan 18.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju
mikudagin klokkan 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Napoleon**

*Tey sum vilja minnast Kathrinu verða biðin at geva eina gávu til Giktafelag Føroya, ið hevur konto í peningastovnunum.*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaða kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Solveig Kjelnæs**
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum
fríggjadagin 4. august, 55 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
týsdagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Monrad, Heri og Joan**.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum mongu, sum sýndu samkenslu, tá okkara elskaði sonur, beiggi og svágur

**Ásmund Bærendsen**
Trongisvágur

brádliga doyði, og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum komu í heim okkara,
og sum ringdu við góðum og troystarríkum orðum.
Tað fløgar í hesu sváru tíð.
Eisini tøkk fyri stóra luttøku, og góð orð um Ásmund
í kapellinum á Landssjúkrahúsinum, í Salem
og á grøvini.
Somuleiðis tøkk til tykkum, sum hjálptu til í Salem,
og lótu til ervið eftir Ásmund.
Eisini ein tøkk til organist, sangarar, berarar og onnur,
sum á annan hátt hjálptu.
Seinast, men ikki minst, ein tøkk fyri blómur og kransar
og til tykkum mongu, sum mintust Ásmund
við gávu til Zarepta.

**Mamma, pápi og systkin við familju**